VÍKINGUR RÍÐUR Á KAMBINUM

Felags fyri bæði steypavinnararnar og NSÍ er, at úrtøkan hevur verið stór, síðani venjaraskiftið fyrr í summar

Jóannes Hansen

Tað er aftur gerandisdagur í Sarpugerði. Leygarkvøldið var fagnaðurin stórur, eftir at tað við sera sannførandi 2-0 sigri á EB/Streymi hevði eydnast at vinna steypafinaluna. Hetta var triðja ferðin, at unga felagið vann løgmanssteypið, og harvið staðfesta tølini, at talan er um ungt og sigursvant felag.

Hesa ferð er talan um grannauppgerð. NSÍ vitjar í Sarpugerði, og allir teir, sum seinastu vikurnar hava tænt Heðini Askham, eru tøkir. Felags fyri NSÍ og Víking er, at feløgini fyrr í summar – og uttan stórvegis dramatikk – skiftu venjara. Síðani Heðin Askham settist við stýrisvølin í Runavík hevur tað roynst væl. Tríggjar tær seinastu ferðirnar hevur úrtøkan verið sjey stig.

– Eg hevði ábyrgdina á Svangaskarði í seinnu hálvfinaluni ímóti Víkingi, sum endaði 1-1. Tá var eg ikki nøgdur við avrikið. Serliga í 1. hálvleiki var tað ikki nóg gott. Vit runnu ov nógv aftaná teimum, og harvið vóru tað teir og ikki vit, sum stýrdu tí, ið gekk fyri seg. Eftir steðgin var tað munandi betri. Um vit skulu síggja nakað positivt í tí avrikinum, so er tað, at tað eydnaðist at vinna eitt stig, hóast vit ikki spældu væl, sigur NSÍ venjarin.

Leygarkvøldið var Heðin Askham eygnavitni til steypafinaluna:

– Síðani Sam Jacobsen og Sølvi Vatnhamar eru komnir aftrat, er liðið styrknað munandi. Liðið er tilvitað um at halda tætt í verjuni, og hóast teir ikki leypa á við so nógvum monnum, so eru teir sera vandamiklir, og nú hevur Finnur Justinussen fingið hol á aftur. Vit vita, hvat tað snýr seg um, men vit halda okkum eisini at hava okkara møguleika, sigur NSÍ venjarin.

Sigfríður Clementsen og Víkingur ríða rættuliga á aldukambinum. Fýra tær seinastu ferðirnar hevur liðið vunnið fulla úrtøku í landskappingini – eitt nú 4-2 sigur á oddaliðnum HB í Gundadali – og krúnan á verkinum var sigurin í steypafinaluni síðsta leygarkvøld. Víkingur er tvey stig frá bronsuplássinum, men tá skal havast í huga, at liðið eigur ein dyst á ímóti 07Vestur á útivølli.

Tá ið NSÍ í fyrsta umfari vitjaði í Sarpugerði, vann heimaliðið 2-1. Finnur Justinussen skoraði bæði málini. Tá ið Víkingur í 10. umfari var í Runavík, vann NSÍ 3-0. Síðstu løtuna spenti Víkingur álopsbogan, og tá skoraði NSÍ tvær ferðir.

joannes@sosialurin.fo

Víkingur - NSÍ:
Rói Jacobsen, klokkan 18.00



Finnur Justinussen skoraði bæði málini í 2-1 sigrinum, tá NSÍ í fyrsta umfari vitjaði í Sarpugerði

Mynd: Álvur Haraldsen

ÆTLA AT SIGA TAKK FYRI SEINAST

Fuglfirðingar hava fingið fult í báðum uppgerðunum ímóti AB, sum bæði í Fuglafirði og á Argjum kendi seg hava betri uppiborið

Jóannes Hansen

– Nú hava vit tríggjar ferðir fyrr í ár tapt tepurt fyri ÍF. Allar ferðirnar hevur tað verið tætt, og vit hava ikki havt marginalirnar við okkum. Vit eru sera spentir at hitta ÍF enn eina ferð. Vit rokna við, at tað aftur hesa ferð verður talan um tætta uppgerð, og nú vóna vit, at tað fer at koppa okkum til fyrimunar, sigur AB venjarin Sámal Erik Hentze.

Undanfarnu tríggjar ferðirnar hevur liðið hjá honum verið plágað av nógvum skaðum. Soleiðis er tað ikki hesa ferð. Allir AB spælararnir eru tøkir, og tað er kapping um plássini. Tvær ferðir hava liðini dystast í landskappingini og eina ferð í steypakappingini:

Fyri einum lítlum hálvum ári síðani – 9. mars – var fyrsta umfar í ársins landskapping. Tá hevði ÍF vitjan av AB. Úrslitið var 2-1 heimasigur. Innskifti Bartal Eliasen skoraði sigursmálið, tá ið tað restaðu fimm minuttir. Argjamenn harmaðust almikið, tí teir hildu seg hava betri uppiborið.

Summarmáladag, 14. apríl, hittust liðini á Argjum. Tað var í steypakappingini, og ÍF vann 2-1.

18. mai var 10. umfar á skránni. Tá hevði AB vitjan av ÍF. Gestirnir fóru avstað við 1-0 sigri. Høgni Madsen skoraði málið, tá ið ein tími var farin, og argjamenn harmaðust, tí teir hildu seg hava betri uppiborið. Inntil tá hevði AB ongan dystin vunnið, og kósin kendist vera ímóti niðurflyting.

Síðani reisti AB seg, og eftir 5-1 lúsing ímóti HB spældu teir átta dystir uttan at tapa. Fyri fjúrtan døgum síðani fekk AB einki burturúr í Gundadali ímóti B36.

– Tað er einki annað at gera enn at seta seg aftur á hestin, og nú fara vit eftir stigi og sigri í Fuglafirði, var staðfestingin hjá argjamonnum, sum nú eru á sjeynda plássi og hava sjálvsálit. Manningarliga eru teir eisini væl betri fyri, enn teir vóru, tá ið teir fyrr í ár tvær ferðir taptu tepurt fyri ÍF. Allir spælararnir eru tøkir undan ferðini norður til Fuglafjarðar.

ÍF er framvegis næstfremst. Fyri tveimum vikum síðani syrgdi Dánjal á Lakjuni fyri 1-0 sigri við Stórá í Trongisvági. Sama dag misti HB tvey stig í Klaksvík, og harvið eru fjarstøðan hjá ÍF og fram til oddasessin aftur sjey stig.

– Vit eru sera væl nøgdir við gongdina, og vit ætla at arbeiða fyri at røkka so langt, sum tað ber til. Vit kunnu ikki annað enn savna okkum um okkara avbjóðingar, og so fáa vit at síggja, hvussu langt tað røkkur, hevur Albert Ellefsen, ÍF venjarin, sagt.

Hanus Thorleifsson er givin í Fuglafirði, veit nordlysid.fo at siga frá ÍF. Aleksandar Jovevic er skaddur, og nýggi U-21 landsliðsspælarin Leivur Joensen er leikbannaður. Fýra ÍF spælarar eru farnir av landinum fyri stuttum, men teir vera allir við ímóti AB. Teir eru Øssur Dalbúð, Jan Ó. Ellingsgaard, Høgni Madsen og Heri Nesá.

ÍF - AB: Dagfinn Forná
leygardagin klokkan 17.00

EB/STREYMUR SKAL REISA SEG

Eftir vónbrotið í steypafinaluni kann tað fara at vísa seg at vera bæði fyrimunur og bági, at mótstøðuliðið hesa ferð er 07Vestur á heimavølli

Leygarkvøldið tapti EB/Streymur steypafinaluna so dyggiliga ímóti Víkingi. Mótstøðumenninir vóru skjótir og ágangandi, og tað megnaðu royndu EB/Streyma menninir ikki at standa ímóti.

Nú er gerandisdagur í landskappingini aftur á skránni, og setningurin er greiður. Fyri at sleppa upp í part í altjóða kappingunum næsta summar er neyðugt at vinna í hvussu so er bronsuplássið, og tað miðja teir í Sundalagnum eftir.

– Vit eru tvey stig frá B36, sum hevur spælt ein dyst meiri enn vit. Í fyrsta lagi ætla vit at røkka bronsuplássinum, og tá ið tað er eydnast, so fara vit eftir silvurplássinum, sigur EB/Streyma venjarin Rúni Nolsøe.

Arnbjørn Hansen verður ikki við í morgin, og tað kann væl vera, at hann ikki verður við aftur í ár. Dánjal Davidsen er farin av aftur landinum, og hann verður neyvan við aftur í ár.

Hjá 07Vestur er tað farið rættuliga at treingja saman um. Tað eru tíggju stig fram til áttanda plássið og harvið møguleikan fyri at bjarga sær lívinum í fremstu røð. Tá ið liðini hittust í Streymnesi í fyrsta umfari vann heimaliðið 4-0. Í Sørvági vann EB/Streymur 2-0. Harvið eigur 07Vestur framvegis fyrsta málið til góða ímóti EB/Streymi í ár.

joannes@sosialurin.fo

EB/Str. - 07 Vestur:
Alex Troleis
leygardagin klokkan 17.00

Effodeildin støðan

NR.	LIÐ	DYSTIR	VUNNI	JAVNT	TAPT	+ MÁL	- MÁL	+/-	STIG
1	HB	20	13	5	2	51	23	+28	44
2	ÍF	20	10	7	3	41	32	+9	37
3	B36	20	7	9	4	34	23	+11	30
4	EB/Streymur	19	8	4	7	34	24	+10	28
5	Víkingur	19	8	4	7	28	31	-3	28
6	NSÍ	19	7	6	6	28	29	-1	27
7	AB	20	6	4	10	27	38	-11	22
8	KÍ	20	4	9	7	37	39	-2	21
9	TB	20	3	7	10	18	36	-18	16
10	07 Vestur	19	2	5	12	18	41	-23	11